Kappríðing við Leynarvatn

Leygardagin verður kappríðingarstevna við Leynavatn, har 30 ross fara at kappast í greinunum, trav, tvíspor ung, tvíspor 2. flokkur og tvíspor 1. flokkur.

Sum vant til slíkar kappingar, so verða rossini – saman við reiðfólki – býtt í bólkar, soleiðis at kappast verður tvey og tvey ella trý og trý.

fyri at koma til eitt hóskandi tal av finaluluttakarum, verður fyrst riðið innleiðandi, og síðani verður farið til finalurnar, har endaligi vinnarin av ymsu bólkunum skal finnast.

Kappingin er sett at byrja kl. 15.00.

-jm

HB er favoritturin

Skulu vit trúgva teimum hjá NordicBet, so er einki at ivast í, at HB er størsti favoritturin um vikuskiftið. Havnarmenninir geva bara pengarnar 1,45 ferðir aftur, um spælt verður upp át teir. Skála er við 1,55 næst størsti favoritturin, tá teir taka ímóti GÍ.

Annars tykist tað vera hampuliga óvist, hvønn veg úrslitini fara at falla um vikuskiftið, tó at ÍF er hampuliga greiður favoritturi, tá B68 kemur á vitjan á Fuglafirði.

Niðanfyri kann síggjast, hvussu oddsini í teimum fimm fyrstudeildardystunum vóru, tá vit hóskvøldið kagaðu inn á síðuna.

-jm

Dystur	1	X	2
VB-B36	2,25	3,55	2,35
HB-KÍ	1,45	3,50	5,70
Skála-GÍ	1,55	3,30	5,10
NSÍ-EB/S	2,10	3,75	2,45
ÍF-B68	1,95	3,40	2,95

kelda: www.nordicbet.com

Favoritt-heitið í Ermasundi

Longu í fyrsta dystinum bresta Ongland og Frakland saman í tí, sum tykist vera uppgerðin millum favorittarnar í bólkinum

BÓLKUR B
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Ikki minst eru vónirnar í Onglandi knýttar David Beckham

Hóast Frakland uttan nakað stig og uttan nakað mál mátti siga farvæl til seinasta HM-endaspælið eftir innleiðandi dystirnar, so er einki at ivast í, at franska liðið á pappírinum er tað sterkasta í allari EM-kappingini.

Við eini perlurað leikarum so sum Zidane, Henry, Thuram, Vieira og Trezeguet hevur liðið á flestu plássum profilar, sum teljast millum absolutta heimstoppin á sínum plássi, og er liðið í hæddina, er ilt at síggja, hvør skal vinna á teimum.

Skal nakar veikleiki finnast, so hevur tjóðin kanska ikki heimsin bestu málverjar, men á øllum øðrum plássum tykist talan bæði at vera um klassaspælarar og –avloysarar, um skaðar ella leikbann raka.

Soleiðis kann venjarin, Jaques Santini, royna at hugsa um, hvørt hann skal nýta Makele, Zidane ella Dacourt sum defensivan miðvallara. Um Trezeguet, Saha ella Wiltord skulu parast við Henry í álopinum, og hvørt álitini í verjuni skulu verða evnaríku Boumsong, Sagnol og Silvestre, ella um tað heldur skulu vera meira royndu Lizerazu, Desailly og Thuram, sum skulu røkja hendan partin.

Stórar bretskar vónir

Skal nakað av liðunum í hesum bólkinum basa Fraklandi so má tað helst vera Ongland, har vónirnar – sum vant – eru sera stórar til landsins kosnu. Talan tykist eisini vera um eitt sera sterkt bretskt lið, sum tó er nakað skert av leikbanninum, sum Rio Ferdinand fekk í februar mánaði. Eitt leikbann, sum í øllum førum tóktist kosta Manchester United dýrt í dystinum um enska meistaraheitið, og sum møguliga eisini verður kostnaðarmikið hjá Onglandi.

Í Sol Campbell, John Terry og Gary Neville hevur Svenn Göran Erikson tó eisini avloysarar til sessin, eins og hann á nógvum øðrum plássum hevur fleiri alternativ. Eitt nú tykist størsta høvuðsbryggið vera, hvussu rúm skal gerast fyri Frank Lampard á miðvøllinum, og um venjarin skal tora at seta álitið á teir báðar ungu álopsleikararnar úr Liverpool. Wayne Rooney (Everton) og Michael Owen (Liverpool).

Tungur arvur

Soleiðis bendir mangt á, at Sveis og Kroatia koma at spæla aðru violin í hesum bólkinum. Sveis hevur seinnu árini roynt at førka seg alt nærri altjóða toppinum, men enn er tó langt ífrá, at liðið veruliga hevur otað seg upp millum tey allarbestu.

Tað gjørdi Kroatia fyri bara seks árum síðani, tá teir vunnu bronsu í HM, men í dag eru tað ikki somu nøvn, sum manna liðið. Ta ferðina hevði landið gylta ættarliðið við Prosenecki, Suker, Stojkovic og øðrum at dúva uppá, og tó at Prso, Zivkovic og Mornar eru leikarar við altjóða royndum, so verður ikki roknað við, at hesir kunnu lyfta arvin somikið væl, at talan skal gerast um fleiri altjóða heiðursmerki í bræði.

Iberiska uppgerðin

Einki er at ivast í, at spenningurin verður stórur, tá grannarnir, Spania og Portugal, fara at dystast

BÓLKUR A
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Kanska er talan um seinasta møguleikan hjá gylta portugisiska ættarliðnum við m.ø. Figo at vinna nakað av týdningi

Fyri spenningin og áhugan hjá heimaáskoðarunum, so kundi lutakastið nærum ikki lagað seg betri, tá tað stóð greitt, at Portugal og Spania verða í bólki saman.

Portugal hevur í mangar mátar staðið nakað í skugganum av Spania á fótbóltskortinum, men hinvegin hava tey hjá vertstjóðini soleiðis av og sett kílar í.

Ikki minst tá Benfica við Eusebio á liðnum steðgaði Real Madrid maskinuni, sum annars hevði vunni fimm tær fyrstu Europa-Cup kappingarnar fyri meistaralið, eins og Porto fyri bara fáum vikum síðani vann Champions League kappingina. Millum annað við at senda Deportivo út í hálvfinaluni.

Á landsliðsplani hevur tað tó verið heldur soltnari hjá liðunum báðum. Hóast serliga Spania mangan hevur verið roknað millum favorittarnar, so hava teir aloftast kiksað í avgerandi løtunum. Leikaratilfarið er í øllum førum framúr, og einki er at ivast í, at er lagið hitt rætta, so kunnu leikarar sum Vicente, Joaquin og Xavi vera ein sonn fragd fyri eygað, og ikki minst, so tykist Spania nú at hava eitt álop í veruligum heimsflokki. Ikki minst fegnast spaniólarnir um, at Fernando Morientes í evstu løtu varð tikin aftur í hópin, har hann skal taka dystin upp við supertalentið, Fernando Torres, um plássið, sum makkari hjá Raul, sum má roknast sum sjálvskrivaður í hópinum.

Gylta ættarliðið

Við leikarum sum Rui Costa, Deco, Luis Figo og Christiano Ronaldo er heldur einki at ivast í, at Portugal hevur leikaratilfarið til tað heilt stóra.

Her hevur trupulleikin tó eins og hjá grannunum verið, at liðið mest sum hvørja ferð hevur kiksað, tá vónirnar hava verið størstar, men í summar kann tó sigast, at støðan er heilt serligt. Liðið hevur fyrimunin av heimavølli, og tann fyrimunurin kann hava ikki so lítið at siga, og so er hetta helst eisini seinasti møguleikin hjá einum gyltum ættarliðið av leikarum at gera seg galdandi. Figo, Costa, Couto og aðrir hava allir verið við til at vinna HM fyri U-lið, og flestu teirra hava eisini vunnið stórar sigrar við feløgum sínum. Enn væntar tó eitt av stóru steypunum fyri landslið.

Kanska kann venjarin, Luiz Felipe Scolari, verða maðurin, sum megnar at flyta liðið seinasta strekkið. Í øllum førum gekst tað honum væl, tá hann fyri tveimum árum síðani stóð á odda fyri brasilsku heimsmeistarunum.

Outsidararnir

Seinastu tvey liðini í bólki A eru Grikkaland og Russland, og nógv bendir á, at tey mugu taka til takkar við teimum báðum niðastu plássunum.

Bæði liðini eru tó væl og virðiliga før fyri at gera um seg, so ein sensatión kann tað neyvan kallast, um antin Spania ella Portugal mugu siga farvæl eftir innleiðandi dystirnar.

Grikkaland hevur longu sýnt hetta í verki, tá teir endaðu framman fyri Spania í undankappingini, og tó at Russland er nógv minkað seinasta góða tíggjuáraskeiðið, so kann liðið á einum góðum degi kvæla mest sum alla mótstøðu í ørandi tempo-fótbólti.

Bulgari sum ókendi faktorurin

Italia eru favorittar, og Svøríki og Danmark fara helst at berjast um næsta sessin

BÓLKUR C
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Við Henrik Larson aftur á liðnum vóna sviar, at teirra álop hevur funnið rætta dynamittið til skógvarnar

Fyri mangar fótboltshugaðar føroyingar hevur tað helst serligan áhuga, at tey bæði norðurlendsku umboðini í EM-endaspælinum, Svøríki og Danmark, komu í sama bólk.

Hinvegin munnu tað eisini vera mong, sum harmast um, at tað eftir øllum at døma verður soleðis, at bert annað teirra kemur víðari úr bólkaspælinum.

Tað er nevnliga einki at ivast í, at Italia er stórfavorittur at vinna bólkin. Gaman í hevur italska landsliðið ikki vunnið seg á tindin síðani 1982, tá Rossi & Co. kundu lyfta HM-steypið, men ikki ein gong ta ferðina tóktist hópurin av hava slíka styrki, sum tann í dag.

Við eitt nú Totti, del Piero, Buffon, Vieri og Zambrotta tykist liðið á navnalistanum veruliga at vera ein avbjóðari hjá Fraklandi. Nakað sum helst eisini verður undirstrikað av, at ein somikið sterkur leikari sum Gattuso eftir øllum at døma noyðist at taka til takkar við einum plássi á beinkinum.

Norðulendsk grannauppgerð

Heilt so sterk nøvn tykjast Danmark og Svøríki ikki at hava, men kortini eru tó nakrir profilar at síggja.

Hjá Svøríki varð tað mest av øllum at sammeta við heimsins størstu jólagávu, tá Henrik Larson boðaði frá, at hann kortini fer at umboða landsliðið aftur. Henke hevur annars bert hugsa um felagsfótbóltin seinnu árini, har hann hevur bumba mál í kilometurvís inn í bestu skotsku deildini.

Nú verður roknað við, at hann saman við Zlatan Ibrahimovic skal skjóta Svøríki víðari í kappingini, men tíðin at fáa glið á samstarvið er stutt, tó at Larsson legði fyri longu í fyrsta venjingarystinum, tá hann skoraði fyrsta málið í svenska 3-1 sigrinum á Pólandi.

Hjá Danmark tykist lagið ikki vera heilt so gott, sum tað er hjá Svøríki. Seinsatu nógvu mánaðirnar hava donsku miðlarnir gramt seg um, at Thomas Gravesen er leikbannaður til fyrsta dystin móti Italia, og roknað verður við, at tað verður sera striltið at fáa miðvøllin at rigga uttan Evertonleikaran. Hartil stendur tað mest sum greitt, at Jesper Grønkjær av persónligum ávum ikki verður við í kappingini, og so fer av álvara at tynnast í danska hópinum, sum ikki hevur so nógvar leikarar av europeiskum topp-klassa at taka av.

Nógvar vónir verða tó ivaleyst settar til Jon Dahl Tomasson, sum veruliga hevur sligið til á meistaraliðn≤um hjá Milan í ár, men um tað í sjálvum sær verður nóg mikið, er tó ein onnur søga.

Ókendi faktorurin

Seinasta landið í bólki C er Bulgaria, og fyri mong man hetta verða ókendi faktorurin í bólkinum. Sæð burtur frá Hristov og Petrov, so munnu tað ikki vera tey heilt nógvu nøvnini í hópinum, sum vekja ans hjá vanliga fótbóltsáskoðarunum, og tað má helst metast sum ein sensatión, um liðið megnar at enda á øðrum av ovastu sessunum í bólkinum.

Liðið megnaði tó at spæla seg fram til endaspælið, og tí skulu teir sjálvandi takast í álvara, og ein tryggur 3-0 sigur á Cameroon í venjingardysti herfyri bendir í øllum førum á, at Bulgaria kann vera vandamikið.

Og so kann Bulgaria helst eisini bara lítað nøkur ár aftureftir. Tað mundu ikki vera so nógv, sum kendu Balakov, Letchkov og fleiri aðrar undan HM-kappingini í '94, men tó fjórða plássinum her tók liðið ta ferðina allan heimin á bóli.

Klassiska uppgerðin

Tað plagar ikki at ganga spakuliga fyri seg, tá Týskland og Holland takast, og hesaferð skulu tey bæði so eisini stríðast við Kekkia

BÓLKUR D
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Hóast Týskland og Holland verða roknað sum favorittar í bólkinum, so er einki at ivast í, at Kekkia og Pavel Nedved fara at geva teimum sera harða mótstøðu

Holland fer helst at standa í teirri óvanligu støðu, at teir eru favorittar, tá teir týsdagin leggja til brots í EM-kappingini við dystinum móti Týsklandi.

Dystirnir millum hesi lond hava annars aloftast verið mettir sum sera opnir, og fleiri ferðir hevur talan eisini verið um framúr spennandi fótbóltsdystir, og soleiðis verður helst eisini hesaferð.

Men Týskland tykist í løtuni ikki at hava somu styrkina, sum seinastu fjórðings øldina ella so hevur sett liðið á absolutta heimstoppin. Á liðnum í dag eru tað kanska bara Balleck og Kahn, sum veruliga kunnu rópast fyri stjørnur, og tá skal eisini havast í huga, at Oliver Kahn als ikki hevur sýnt somu styrki í ár, sum hann so mangar aðrar ferðir hevur gjørt, og heldur ikki Ballack hevur havt sítt besta ár, tó at eingin ivast í týdningi hansara fyri landsliðið.

Hjá Hollandi tykist hinvegin ikki skorta upp á stjørnunøvini. Nakað sum føroyska fótbóltslandsliðið eisini mátti sanna, tá Dick Advocaat í vinardystinum í Lausanne skifti mest sum heilt lið av heimsstjørnum um við eitt annað. Einasti veruligi veikleikin á liðnum tykist vera í verjupartinum, har Jaap Stam helst er einasti leikarin við veruliga altjóða klassa, men fæst miðvøllurin at rigga nóg væl, er als ikki víst, at trýstið á verjuna verður so stórt.

Her er tað tó ein dyggur smeitur, at van Bommel varð noyddur at geva avboð við skaða, tí uttan hansara risastóra arbeiði á defensiva miðvøllinum, kunnu eitt nú Davids og Seedorf verða noyddir at átaka sær nógvar verjuskyldur, og hetta kann ganga út yvir offensiva partin av spælinum.

Vandamiklir kekkar

Og hóast hesi bæði liðini á pappírinum kanska eru tey stóru, so er helst eingin teirra, sum roknar við, at Kekkia bara skal skúgvast til viks uttan víðari.

Síðani teir púra óvæntað vunnu silvur í EM-kappingini í 1996 hevur Kekkia verið eitt av liðunum, sum hevur gjørt mest um seg í Europa, og tó at HM-luttøkan kiksaði seinst, so tykist liðið framvegis at hava stóra styrki.

Ikki minst verður nógv væntað av besta leikaranum í Europa í fjør, Pavel Nedved, men hóast liðið telir eina slíka stjørnu, so er talan eisini um eitt framúr sterkt kollektiv, har allir stríðast fyri allar, og har tað tí er so sera trupult hjá mótstøðuni at finna vegin fram til meskarnar. Nakað sum Holland eisini ásannaði í undankappingini, har Kekkia vann tann bólkin.

Sensatiónin

Seinasta liðið í bólki D er Letland, og bara tað at landið er umboðað í endaspælinum, verður roknað sum ein sensatión. Tað var í øllum førum ikki væntandi, at Turkaland mátti lúta í play-off dystunum móti Letlandi, og so er spurningurin, hvørt landið eins og Slovenia áður hevur gjørt tað, megnar at taka øll á bóli.

Tað er tó lítið, sum bendir á, at so skal vera, men vanliga plagar hvørt endaspæl at innihalda sínar sensatiónir, og kanska Letland verður ein av hesum hesaferð.

Dystirnir í bólkaspælinum

Portugal-Grikkaland
Bólkur A: 12.06 kl. 17.00

Spania-Russland
Bólkur A: 12.06 kl. 19.45

Sveis-Kroatia
Bólkur B: 13.06 kl. 17.00

Frakland-Ongland
Bólkur B: 13.06 kl. 19.45

Danmark-Italia
Bólkiur C: 14.06 kl. 17.00

Svøríki-Bulgaria
Bólkur C: 14.06 kl. 19.45

Kekkia-Letland
Bólkur D: 15.06 kl. 17.00

Týskland-Holland
Bólkur D: 15.06 kl. 19.45

Grikkaland-Spania
Bólkur A: 16.06 kl. 17.00

Russland-Portugal
Bólkur A: 16.06 kl. 19.45

Ongland-Sveis
Bólkur B: 17.06 kl. 17.00

Kroatia-Frakland
Bólkur B: 17.06 kl. 19.45

Bulgaria-Danmark
Bólkur C: 18.06 kl. 17.00

Italia-Svøríki
Bólkur C: 18.06 kl. 19.45

Letland-Týskland
Bólkur D: 19.06 kl. 17.00

Holland-Kekkia
Bólkur D: 19.06 kl. 19.45

Russland-Grikkaland
Bólkur A: 20.06 kl. 19.45

Spania-Portugal
Bólkur A: 20.06 kl. 19.45

Sveis-Frakland
Bólkur B: 21.06 kl. 19.45

Kroatia-Ongland
Bólkur B: 21.06 kl. 19.45

Italia-Bulgaria
Bólkur C: 22.06 kl. 19.45

Danmark-Svøríki
Bólkur C: 22.06 kl. 19.45

Týskland-Kekkia
Bólkur D: 23.06 kl. 19.45

Holland-Letland
Bólkur D: 23.06 kl. 19.45